



Handil og Kaffi á Vaglinum fekk eisini óvæntaðar kaffigestir mánadagin.
- Bill helt at kaffi frá Brell, sum vit selja, smakkaði heilt væl, siga tey á ALV.
Handilin verður rikin av fólki sum eru arbeiðstarnaði, og vørurnar verða latnar av avlaminspensionistum.
Frá vinstri síggja vit Fanny Joensen, Sunrid Højgaard, Bill Clinton, Kristina Larsen, fyristøðukvinna á Alv, og leiðararnir Charlotta á Váli og Óluvá







Fyrrverandi forsetin vitjaði eisini í Gamla Bókahandli. Har keypti hann sær Dimmuna og Sosialin, umfram nakrar bøkur um Føroyar sum ferðamál.
Fyrr í summar fekk H. N. Jacobsens bókahandil tann stóra heiðurin at koma á listan yvir bestu og hugnaligastu bókahandlar í heiminum, hjá danska blaðnum Politiken. Gamli bókahandil verður her sammettur við bókahandlar í New York, Havana, Rio De Janeiro, Berlin og Rom. Á listanum var ongin danskur bókahandil.









